# Avgera morgunlesturin í næstu viku




**Lagnan hjá nógv umtalaða morgunlestrinum verður avgjørd í komandi viku. Sostatt er vón fyri at hann aftur kemur á skránna sum áður**

MORGUNLESTUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í komandi viku skal avgerð takast um, hvørt morgunlesturin aftur verður settur á skránna eins og fyrr. Tað váttar kringvarpsstjórin, Annika Mittún Jacobsen.

Summarið er av, og Kringvarp Føroya er í holt við arbeiðið at leggja um til vetrarskránna. Í hesum sambandi hevur verið heitt á Kringvarpið um aftur at seta morgunlesturin á skránna, har hann áður var, klokkan 9.50.

Henda áheitan verður tikin upp til viðgerð, og verður tað so upp til tey, ið sita við evstu ábyrgd av skránni, at gera av, um morgunlesturin aftur skal koma á skránna.

Henda avgerðin verður altso tikin í næstu viku, og inntil tá er ilt at gita um, hvørt morgunlesturin stendur ella fellur.

*Morgunlesturin kemur møguliga aftur á skránna nú Kringvarp Føroya er við at broyta um til vetrarskránna aftur*
*savnsmynd*

NORA skaber samarbejde
Støtte til projektsamarbejde i Nordatlanten | Ansøgningsfrist 5. oktober 2009
NORA Nordisk Atlantsamarbejde | Læs mere på: www.nora.fo
SENDISTOVAN


sansir.fo

Leiðari til Tryggingardeildina hjá ALS

## Eitt nýtt stig á starvsleiðini

Ert tú tann føddi leiðarin, sum dugir at fáa fólk at arbeiða væl saman? Dugir tú at fáa fólk at skapa úrslit? So er eitt spennandi starv sum leiðari á Tryggingardeildini leyst at søkja.

Tryggingardeildin umsitur vanligan arbeiðsloysisstuðul, fiskavirkisskipanina, arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi, flyting millum A-kassar, farloyvisskipanina og Barsilsskipanina.

Høvuðsuppgávan hjá deildarleiðaranum verður at leiða og skipa dagliga arbeiðið á deildini. Saman við stjóranum og deildarleiðaranum á Ávísingardeildini og Fíggjar- & Fyrisitingardeildini myndar deildarleiðarin á Tryggingardeildini leiðsluna á ALS.

Leiðarin á Tryggingardeildini umboðar ALS í norðurlendskum samstarvi, og tí skalt tú rokna við nakað av ferðing.

Starvið er fjølbroytt við nógvum avbjóðingum, og tí krevst, at deildarleiðarin hevur hóskandi útbúgving og viðkomandi royndir. Fyrimunur er, um deildarleiðarin er útbúgvin løgfrøðingur, hevur góðan kunnleika til føroyska arbeiðsmarknaðin og innlit í samfelagsviðurskifti annars.

Vit leggja dent á tíni leiðara- og samstarvsevni. Tú hevur evnini at stíla fyri og samskipa. Tú varðveitir yvirlitið, hóast nógv hendir samstundis, samskifti er tín sterka síða, og tú dugir væl at stuðla og motivera.

Lønin verður sambært avtalu, og starvið verður sett skjótast til ber. Síðsta freist at søkja starvið er tann 14. sept. 2009 kl. 12.00.

Umsóknir skulu stílast til Ernst Jacobsen, stjóra á ALS, sum fegin sigur tær meira um starvið á telefon 34 95 50 ella teldupost ernst@als.fo.

ALS

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 16 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022
FO-110 Tórshavn • Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo